## Svik skal kosta nógv meira

Venjarin hjá Fulham í Premier League, Chris Coleman, vil hava, at tað skal kosta spælarum og venjarum nógv meira, um teir ikki fylgja teimum reglum, sum eru galdandi á transfer-marknaðinum.

- Ein og hvør, sum verður dømdur sekur, skuldi verið bannaður í fótbóltsspælinum fyri lívið, sigur Coleman.

Tað hevur skapt stóra øsing í Onglandi, at BBC fyri stuttum hevði sending um trupulleikan, tá feløg seta seg í samband við spælarar, heldur enn tosa við feløg teirra, soleiðis sum reglurnar fyriskriva.



## Celtic skerdir undan FCK-dystinum

Eftir øllum at døma má Chelsea vera vandamikla áleyparan, Jan Vennegoot of Hesseling, fyriuttan, tá teir týskvøldið spæla móti donsku meistarunum úr FCK.

27 ára gamli áleyparin noyddist skaddur av føllinum, tá Celtic um vikuskiftið spæla grannauppgerð móti Glasgow. Og roknað verður ikki við, at hann er førur fyri at spæla longu týskvøldið.

Celtic vann annars uppgerðina 2-0, og var tað danski miðvallarin, Thomas Gravesen, ið skoraði fyrra málið.

# B36 vann 3. deild

**Við finalusigri móti FS Vágum 2004 tryggjaði B36 sær í dag sigurin í 3. deild**

FÓTBÓLTUR
*Rolant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað var annars FS V 04, sum kom á odda, tá Jón Gregersen í fyrra hálvleiki skoraði eftir frísparksstøðu. Rógvi Róin javnaði fyri B36 minuttin eftir, og stutt undan steðginum legði Magni á Lakjuni B36 framum.

Tann støðan helt sær til fram móti dystarenda, tá Djóni N. Joensen við einum sera góðum skoti avgjørdi dystin við málinum til 3-1.



*B36-liðið, sum nú hevur vunnið kappingina í 3. deild. Standandi eru Vinjard Guttesen, Sámal Ímundarson, Egin Høgnesen, Djóni N. Joensen, Jens Kristian Hansen, Jákup Mørk, Bárður Anthoniussen, Ólafur Debes, Jóannes Guttesen, Magni á Lakjuni, Tummas Eli Hansen. Sitandi eru Rógvi Róin, Hans Jacob Heinesen, Hallur Holm, Kaj Niclasen, Kári Gullfoss, Dánjal Petur Johansen, Petur Martin Johansen og Kári Johansen*

*Mynd: Bjarke Sørensen*

# VB/TB er føroyameistari hjá dreingjum

Samanlagda drengjaliðið í Suðuroy tryggjaði sær leygardagin føroyameistaraheitið. VB/TB vann sín dyst, og tá nærmasti kappingarneytin tapti, var FM-heitið vissað

VB/TB spældi í næstseinasta umfarinum á heimavølli ímóti KÍ, og tað gjørdist til tryggan 6-1 sigur til VB/TB.

Samastundis kláraði næsti kappingarneytin hjá VB/TB ikki at vinna sín dyst. NSÍ spældi ímóti B36, og B36 vann 4-1.

Harvið er tað vist, at VB/TB hevur vunnið FM í dreingjadeildini, hóast eitt umfar er eftir at spæla.



*Samansetta dreingjaliðið í Suðuroynni, sum í fyrstu royndini vissaði sær FM-heitið*

# Steypafinalan í leysum lofti

**Eftir fótbóltsfundin í gjárkvøldið er tað greitt, at hildið verður fram við landskappingini soleiðis, sum tað er ásett í skipanini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinnu hálvfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið verða nú mikukvøldið. Nær finalan verður er ógreitt.

Á fundinum millum fótbóltsfeløgini og FSF í gjárkvøldið var breið semja um, at landskappingin skal halda fram soleiðis, sum hon er ásett í skipanini. Tað vil siga, at 25. umfar verður spælt 1. oktober, sum kappingarnevndin annars hevði ásett skuldi vera steypafinaludagur.

Kappingarnevndin spurdi seg fyri, og fundurin í gjárkvøldið var samdur um, at tað hevði verið sera óheppið, um steðgur hevði verið í Formuladeildini í tríggjar vikur - frá sunnudegnum 24. september, sum er í morgin, og fram til 15. oktober (orsaka av landsdysti verður einki umfar 8. oktober).

Í morgin verður 24. umfar, og næsta sunnudag, sum er 1. oktober, verður 25. umfar á skránni. 15. oktober verður 26. umfar, og 27. og síðsta umfarið verður leygardagin 21. oktober.

Í næstu viku verður støða tikin til, nær finalan um Løgmanssteypið skal spælast.